Tórshavn, 15. mars 2011

# Tey 9 boðini – vegleiðing og dømi um vanliga byggimálsviðgerð

*LTM: Listin er ikki ein troyting av (KBB-99) kunngerðina um brunaverju og viðger tí ikki brunatrygd út í æsir ella niður í allar smálutir.*

**1 Nýtsluendamál og mest loyvda fólkatal**

- Hvørja grein í KBB-99 kemur bygningurin undir, og hvussu nógv fólk er hann ætlaður til?
- Er talan um bygning til bústað, óhjálpin ella til eldhættisligt virksemi ella annað?
- Hvat sigur kommunala byggisamtyktin um húsavídd og nýtslu? (Sethúsaøki, vinnuøki o.s.fr.)
- O.s.fr.

**2 Fráleikakrøv og staðseting á grundøki**

- Eru fráleikar til aðra bygging, grannamark, miðu á gøtum og vegum nøktandi?
- Hvussu høgur er bygningurin frá lendi til bjargingarop – vindeygu, altan, hurð?
- Hvørjum er bygningurin klæddur við?
- O.s.fr.

**3 Brunasundurskiljing, eldverjuveggir og brunadeildarveggir o.t.**

- Er bygningurin sundurskilaðu í brunadeildir og/ella brunaeindir og/ella roykøkir?
- Eru rýmingartrappur, trygdartrappur, lyftir, slokur v.m. í egnari brunadeild?
- Er lagt upp fyri brunaverju í hornagripum (vinkulsmitta), høg/lá smittu millum brunadeildir í ymiskum hæddum?
- Eru rýmingargongdir gjørdar sum brunadeild ella brunaeind?
- Eru rúm og slokur til burturkast og skarn, eldstaðir, skorsteinar, luftnýggjanarútbúnaður og aðrar skipanir v.m.?
- O.s.fr.

**4 Krøv til opilsi í brunasundurskilingum, hurðum, portrum, v.m.**

- Hava hurðar, portur lemmar v.m. nøktandi góðsku?
- Er krav um pumpur og (ABDL) sjálvvirkandi hurðaafturlatingarskipan?
- Hevur brandglas nøktandi góðsku?
- O.s.fr.

**5 Rýmingar- og bjargingarviðurskifti**

- Eru nøktandi tal av rýmingarleiðum frá uppihaldsrúmum?
- Eru rýmingarhurðar, rýmingargangir og rýmingartrappur umframt útgongdir (út- og niður á lendi uttandura) nóg breiðar?
- Er fráleikin millum rýmingartrappur og útgongdir yvirhildin?
- Skulu rýmingargangir skilast sundur við royktættum hurðum við ABDL-skipan?
- Eru rýmingarleiðir greiðar?
- Lata rýmingarhurðar upp rættan veg?
- Er tal, stødd og plasering av bjargingaropum og upplating nøktandi?
- O.s.fr.

**6 Konstruktiónir og yvirflatur**

- Eru berandi húsalutir gjørdir úr nøktandi dimensiónum og við nøktandi brunatrekleika?
- Er krav til roykop í samband við berandi konstruktiónir?
- Eru krøv til veggja- og loftklæðingar og gólválegging nøktandi?
- Eru klæðingar uttan nøktandi?
- O.s.fr.

**7 Brunatekniskar skipanir**

- Hvat fyri tekniskar skipanir skulu vera í bygninginum?
  - Hondsløkkiútgerð,
  - roykvarnari,
  - slanguskáp,
  - útgonguljós og neyðljós,
  - ávaringarskipan,
  - (ABDL) sjálvvirkandi hurða afturlatingarskipan,
  - (ABA) sjálvvirkandi brunaávaringarskipan,
  - (AVS) sjálvvirkandi sprinklaraverja og
  - o.s.fr.
- Er krav til roykop ella (ABV) brandventilatión í samband við rýmingarleiðir?
- O.s.fr.

**8 Insatsmøguleikar fyri bjargingar- og sløkkiarbeiðið**

- Tilkoyring og atgongd?
- Bjargingarøki, bjargingarmøguleikar?
- Sløkkivatn?
- Stigrør?
- Roykútluftan umvegis hurðar, vindeygu, roykop og brandventilatión?
- O.s.fr.

**9 Rakstrar- og viðlíkahaldsætlan**

- Hvussu skal virkin brunatekniskur útbúnaður (brunatekniskar skipanir) kannast og røkjast?
- Hvussu verða húsalutir kannaðir og røktir?
- O.s.fr.